

## Holst aftur á blettinum

Christian Lamhauge Holst hevur drigist við skaða seinastu vikurnar, men leygardagin spældi hann aftur. Lyngby spældi venjingardyst ímóti FCK 2, og Lyngby vann 4-0. Christian Lamhauge Holst var á beinkinum frá byrjan, men hann gjørdi beinanvegin um seg, tá ið hann varð settur inn. Holst skoraði til 2-0, áðrenn Lyngby síðani skoraði tvey mál afturat.

## Andrew spældi javnt

Undan venjingardystinum hjá Fremad Amager um vikuskiftið hevði føroyski álopsspælarin Andrew av Fløtum skorað fýra mál í tveimum dystum. Leygardagin megnaði Andrew tó ikki at skora í dystinum ímóti Hvidovre. Tað var Hvidovre, sum legði seg á odda fyri steðgin, men Fremad Amager kláraði at javna beint fyri hálvleikin við máli, sum Thomas Christensen gjørdi. Dysturin endaði 1-1.

# Vóru sera uppsettir

Ein av ungu leikarunum hjá Mjølni, sum spældi ein góðan dyst í steypafinaluni ímóti ÍF, var 20 ára gamli Thorvald Danielsen, sum spældi á diagonalinum hjá Mjølni. Hann helt, at hetta var bara dagurin hjá Mjølni.

- Vit eru bara nógv betri enn ÍF í dag. Vit hava verið sera uppsettir. Vit komu suður til Havnar í gjárkvøldið. Vit hava vant saman í Havnini, og vit hava sovið saman, og eingin ivi var um, at henda dystin vildu vit bara vinna. Vit hava virkiliga vant hart fyri at vinna hesa finaluna, og tá sá man aftur í dag.

Fleiri leikarar hjá ÍF høvdu ligið sjúkir undan finaludystinum, men Thorvald helt ikki, at hetta hevði komið at ávirkað úrslitið.

- Vit vistu, at fleiri av eikarunum hjá ÍF høvdu ligið sjúkir, men eg eri sikkur uppá, at vit høvdu vunnið allíkavæl. Vit vóru klárir yvir, at vit máttu fáa eina góað byrjan, tí ÍF hevur eitt sera gott lið. Teir kempa sera væl, men í dag høvdu teir ongan møguleika. Tað hendir onkuntíð, at man byrjar at slappa av, tá man kemur á odda 2-0, men í dag var tíbetur eingin ivi. Vit vóru betur allan vegin, og hetta gekk, sum tað skuldi, segði ein fegin Thorvald eftir dystin.

**-teitur**



*Klaksvíkingarnir vóru fyrst og fremst meira uppsettir, helt Thorvald Syderbø eftir trygga finalusigurin*

*Mynd: Álvur*

Mjølnir-ÍF 3-0 (25-16, 25-21, 25-15):

# Mjølnir í essinum – húð

**Mjølnir læt als ongan iva vera um, hvat var betra liðið í steypafinaluni hjá monnum. Teir snøgt sagt smurdu ÍF av, og spenningur kom als ikki í dystin, tí munurin var alt ov stórur á liðunum henda dagin**



FLOGÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Leygardagin var høllin á Hálsi karmur um stóran steypafinaludag í flogbólti, har bæði kvinnurnar og menninir skuldu í dyst. Seinni dysturin á degnum var millum bestu mansliðini hjá Mjølni og ÍF, og her var lagt upp til ein sera spennandi dyst.

Bæði Mjølnir og ÍF hava stórar traditiónir í flogbólti, og síðstu árini hava hesi bæði liðini verið væl við í oddinum í føroyskum mansflogbólti. Okkurt árið hava onnur lið eisini verið millum tey ovaru, men í ár hevur kappingin í bestu flogbóltsdeildini bert staðið ímillum hesi bæði liðini.

Í landskappingini hevur ÍF ligið á odda mest sum allan vegin. Munurin hevur tó ongantíð verið serliga stórur, og tá menninir hjá ÍF taptu fyri Fram seinasta vikuskiftið, so bleiv dysturin í oddinum púra opin. Munurin minkaði niður í eitt stig, so nú kann alt avgerast í seinasta innanhýsis dystinum millum liðini.

Í steypakappingini sló Mjølnir tó til alt fyri eitt. Teir vunnu FK-kappingina tíðliga á flogbóltsárinum, og so kundu teir longu tá byrja at fyrireika seg til steypafinaluna eftir finalusigur á Fram. Fuglfirðingarnir máttu í sínum lag bíða heldur longri, men tá Mjølnir-kappingin var á skránni í januar, slógu teir til. Teir møttu SÍ í finaluni, og her vunnu teir uttan stórvegis trupulleikar.

So var endiliga klárt til eina dreymafinalu ímillum tvey tey sterkastu liðini í mansflogbólti í løtuni, og flest øll flogbóltsáhugað mundu vænta ein fantastiskan dyst millum tvey sterkastu liðini, men tey blivu sera skuffað, tí dysturin bleiv ikki nakað stórt flogbóltsupplivilsi.

### Mjølnir fekk flúgvandi byrjan

Sjálvt um ÍF kanska hevur havt munin á Mjølni í ár, so vóru tað tó klaksvíkingarir úr Mjølni, sum fingu eina flúgvandi byrjan upp á dystin. Dysturin var ikki meir enn komin í gongd, so hevði Mjølnir lagt seg á odda 5-1, og longu tá føldi venjarin hjá ÍF, at her var neyðugt við einum Time Out fyri at fáa spælararnar ordiliga klárar til uppgávurnan á vøllinum.

Time Out'ið hjá ÍF vísti seg eisini at rigga, men bert í eina lítla løtu. Teir komu upp á 5-4, men so var aftur galið hjá ÍF. Mjølnir setti teir undir eitt støðugt trýst við teirra sera sterka blokki, og hetta gav ÍF stórar trupulleikar. Lítla løtu seinni hevði Mjølnir eisini vunnið seg upp á 15-7, og nú tóktist settið í roynd og veru at vera avgjørt. Mjølnir kempaði nógv betur enn ÍF í fyrsta setti. Teir vóru nógv sterkari á gólvinum, har teir fingu nógvar ómøguligar bóltar upp, og ikki minst í móttøkunum vístu klaksvíkingarnir seg at vera nógv sterkari.

Fyrsta sett endaði við einum tryggum 25-16 sigri til Mjølnir, og sjálvt um teir tóktust slappa heldur nógv av síðstu bóltarnar, so var sigurin ongantíð í vanda í hesum settinum, tí ÍF fekk ongantíð fótin fyri seg.

### Sera sterkar miðjur

Í øðrum setti var eitt sindur javnari enn í tí fyrsta. Nú var ÍF nógv betur við, og fyrstu løtuna fylgdust liðini væl. Nógvir av bóltunum vóru langir, og tað tóktist, sum hvørki av liðunum hevði hug at geva skarvin yvir. Bæði liðini bardust væl í gólvinum fyri at fáa bóltarnar uppaftur , og hetta gav úrslit í nógvum spennandi bóltum.

ÍF tóktist tó at vera heldur omaná hesa løtuna, og mitt í settinum vístu teir hví. Teir byrjaðu at draga frá Mjølni, og í eina løtu tóktist Mjølnir hava ávísar trupulleikar við at steðga ÍF. Hetta revsaði ÍF eisini og legði seg á odda 17-14 í øðrum setti, og nú tóktust fugfirðingarnir hava funnið stevið, men brádliga steðgaði fullkomiliga upp.

Mjølnir tók yvir aftur á øllum frontum, og serliga miðjurnar vístu eitt skifti sera gott spæl. Hjalti Josephsen og Jón Syderbø vóru sera sterkir í bæði álopi og blokkinum hesa løtuna, og hetta gav ÍF stórar trupulleikar. Nú legði Mjølnir seg brádliga á odda, og so var fyri so vítt liðugt hjá ÍF. Mjølnir vann eisini annað sett 25-21, og nú líktust teir brádliga einum stórfavoritti at vinna steypafinaluna hjá monnum.